


*Týsnáttina loystu Heykur og Falkur. – Nú skuldi alt verið í lagi, sigur Jan Øregaard hjá Faroe Seafood Mynd: Jens Kr. Vang*

# Óstøðugt veður og smáligur fiskiskapur

**Nýggjastu ísfiskatrolararnir í føroyska fiskiskipaflotanum, Heykur og Falkur, loystu týsnáttina. Nú eru skjótt tveir mánaðir, síðan nýbygningarnir komu úr Spaniu**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Seinastu dagarnar hava ikki tær nógvu upsalandingarnar verið kring um landið.

Fiskiskapurin hjá partrolarunum hevur ikki vignast so væl, og haraftrat hava líkindini verið óstøðug. Hinvegin hava fleiri línuskip verið inni og lagt veiðina upp, og í Klaksvík hava einir seks línubátar landað í gjár og í dag.

### Smáar nøgdir

Á Faroe Seafood veit Jan Øregaard, sum stendur fyri innkeypi av fiski, at siga, at Rókur og Lerkur landaðu í Saltangará í gjár. Skipini høvdu stívliga 150.000 pund tilsamans, meginparturin upsi.

- Rókur og Lerkur høvdu stuttan túr. Rókur og Lerkur fóru út seinasta leygardag og vóru longu inni aftur í gjár.

Í dag landar djúpvatnstrolarin Eydna góð 100.000 pund í Havn. Eydna er fyrrverandi Vesturvarði.

Jan sigur, at í løtuni eru øll skipini úti, og hann væntar, at Bakur og Stelkur landa í Saltangará mánamorgunin og Vesturbúgvin í Vestmanna.

- Vit vænta eisini Grønanes og Vesturtúgvuna týsdagin. Annar landar vanliga í Vestmanna og hin í Havn, sigur hann.

### Heykur og Falkur

Endiliga hava nýggjastu ísfiskatrolararnir í føroyska fiskiskipaflotanum loyst.

- Heykur og Falkur fóru út týsnáttina, og hetta er soleiðis fyrsti veruligi túrurin hjá hesum báðum skipum, síðan tey komu til landið úr Spaniu 11. desember í fjør.

Jan Øregaard sigur, at tey nú vóna, at skipunum fer at gangast væl eftir ymiskar barnasjúkur og óhapp.

- Nú skuldi alt verið í lagi, leggur hann aftrat.

# Funnin á lívi eftir 9 samdøgur í stórkava

**Tey ætlaðu sær bara út at avmynda villar hestar, tá ið herviligt kavarok kom á tey**

VETUR
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Hjúnini Thomas og Tamitha Garner í Utah í USA vóru farin ein túr í bili sínum saman við hundinum, Medusa. Ætlanin við ferðini, sum kom at vara í heili níggju samdøgur, var at avmynda villar hestar.

Herviligt kavarok kom yvir tey, og bilurin stóð fastur í kavanum. Tá ið fólk varnaðust, at tey ikki fingu fatur á hjúnunum, varð umfatandi leiting sett í verk. Men eingin visti, hvar hjúnini vóru. Seinast, nakar hevði sæð tey, keyptu tey bensin á bilin á eini bensinstøð í lítla býnum Panaca.

Nógvastaðni var ógjørligt hjá leitingarliðnum at náa fram í bili og ein av teimum, sum leitaði við kavaskutara, doyði undir leitingini, tá skutarin gjørdist fastur í kavanum.

Hjúnini vórðu verandi í bili sínum, men tá ið dagarnir gingu og maturin, tey høvdu við sær, gekk undan, fóru tey úr bilinum og til gongu. Sambært AP-tíðindastovuni vóru tey bert í buksum og tunnum jakkum. Kortini yvirlivdu tey við at røra seg og kynda bál á leiðini.

Tá ið tey høvdu gingið einar 25-30 kilometrar, fann ein maður, sum luttók í leitingini við traktori, tey burturblivnu, sum eingin hevði frætt frá í samfull níggju samdøgur.

Hjúnini vórðu flutt á Valley View Medical Center í býnum Cedar til viðgerðar og hava tað eftir umstøðunum gott.

Hundurin Medusa, sum eisini var við á hesi ferðini, hevði tað eisini gott, skrivar AP.

